

*Lena og Niclas vóru væl uppløgd á konsertini sunnukvøldið í Læraraskúlahøllini*

Grót, sól og regn:

# Væleydnað tónleika-vikuskifti



*Teitur Lassen spældi sera væl á konsertunum, sum hann hevði saman við Lenu og Niclas*

**Tónleikasamtakið Grót skipaði um vikuskiftið fyri konsertum í Gøtu og í Havn. Teitur og Lena og Niclas fóru á pall, meðan ein sitandi lurtarafjøld hugnaði sær óført, eins og fólkini á palli. Tónleikurin verður nú innspældur og fløgur eru væntandi seinni í ár**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*

Lagt var rættiliga upp til livndi tónleik og hugna, tá Grót um vikuskiftið skipaði fyri tveimum konsertum við Niclas og Lenu og Teiti Lassen.

Fyrra konsertin var í Losjuni í Gøtu fríggjakvøldið, hin seinna í Læraraskúlahøllini sunnukvøldið.

Talan var um konsert, tó at borð vórðu sett upp.

– Tað var sera hugnaligt. Eitt slag av sitikonsert, ið hóskaði og riggaði betri enn café, sigur ein væl nøgdur Niclas.

Eisini fyrireikararnir eru væl nøgdir.

- Í losjuni var fullsett og í Læraraskúlahøllini vóru eini 100 fólk og tað var so passaligt, tá borð vórðu sett upp, sigur Jón Tyril frá Grót.

- Vit royna at gera umstøður fyri livandi tónleikin og her høvdu vit tvey av bestu nøvnunum, ið eisini hava roynt seg í útheiminum, so stuttligt er at geva teimum høvi at spæla, tá tey vitja heima, sigur ein væl nøgdur Jón Tyril

## Sólin og regnið

Eisini tónleikararnir eru væl nøgdir.

Niclas metir, at hetta var eitt hugnaligt tiltak.

- Teitur spældi av síni komandi fløgu við føroyskum løgum, sum hann annars eisini arbeiðir við í upptøkuhølunum hesa vikuna. Eg og Lena spældu ymiskt og fara eisini undir nýggja fløgu einaferð í mars, sigur Niclas.

Bæði Teitur og eisini Niclas og Lena høvdu nógv nýtt á skránni. Nýtt var eisini at síggja og hoyra Lenu leika guitar og hon leikti nógv, ið hon sjálv hevur skrivað. Og tónleikurin hetta kvøld var væl fagnaður.

Teitur Lassen er júst afturkomin úr Hollywood. Hann metir, at slíkur konsertformur er óført forum, og hann fegnast stórliga um eitt tónleikasamtak, sum Grót, sum fær slíkt í lag.

- Hasi fólkini er ófør, sigur Teitur, sum hesa vikuna tekur upp í Føroyum. Niclas er framleiðari. Talan er um fløgu við føroyskum løgum og fløguætlanin hevur heitið Sólin og Regnið.

- Tað er langt síðani, fólk hava hoyrt meg syngja á føroyskum, sigur Teitur, ið metir nýggju fløguna hoyra heima í fløgukassnum við fólkapoppi.

Tað gekk væl hjá Teiti í Hollywood, har hann leikti til eina veitslu, har sjónleikarar komu saman.

Eisini gekk vikuskiftið væl og so gongur vónandi eisini væl í upptøkuhølunum hesa vikuna. Fløguna hjá Teiti sleppa vit at hoyra einaferð í apríl. Lena og Niclas byrja sínar upptøkur í mars.



Búskapur og vinna:

## Norskir bankar dýrir

Munurin á innlánsrentuni og útlánsrentuni í norskum bankum er næstan eitt prosentstig størri enn í svenskum bankum. Í Noregi er munurin 2,5 prosentstig, og í Svøríki er hann 1,6 prosentstig. Í teimum donsku bankunum er munurin at kalla tann sami sum í teimum svensku, 1,7 prosentstig.

Munurin á innlánsrentuni og útlánsrentuni verður ofta nýttur sum mynd av, hvussu stór kappingin er millum bankarnar um viðskiftafólkini, og sambært tølunum er kappingin serliga lítil í Noregi.

Norskir bankamenn halda kortini ikki, at tølini eru heilt rættvís. Teir vísa m. a. á, at í Danmark og Svøríki hava tríggir teir størstu bankarnir meiri enn 80 prosent av marknaðinum, og tað er munandi meiri, at teir tríggir størstu bankarnir í Noregi hava.

## Týskland slapp

Roknað hevur verið við, at fíggjarmálaráðharrarnir í ES-londunum fóru at geva Týsklandi eina ábreiðslu, tí landið hevur so stórt hall á fíggjarlógini, men ábreiðslan kom kortini ikki.

Týska stjórnin hevur sjálv boðað frá, at hallið verður 2,7 prosent av bruttotjóðarframleiðsluni, og tað er ikki langt frá hámarkinum hjá ES, sum er 3,0 prosent. Spania, sum hevur formansskapin í ES, fekk tosað hini londini frá at senda Berlin eina ávaring, men framman undan hevði spanska stjórnin tryggjað sær eitt lyfti frá týsku stjórnini um at halda aftur í teimum almennu útreiðslunum.

Belgia, Finnland, Holland og Eysturríki bardust sum úlvur á skóg fyri at fáa hini londini at taka undir við at átala Týskland, meðan Bretland stríddist ímóti av øllum alvi. Stjórnin hjá Tony Blair hevur boðað frá munandi íløgum í jarnbreytakervið og heilsuverkið, og hon er tí ikki serliga hugað fyri, at ES kanska eisini fer at venda eygunum ímóti bretska fíggjarpolitikkinum.

UTTAN ÚR HEIMI

# 66 ákærur ímóti Milosevic

**Høvuðsákærin við krígsbrotsmannadómstólin í Haag, Carla del Ponte, samanbar tilburðirnar í gamla Jugoslavia við ræðuleikarnar í miðøldini, tá hon í gjár byrjaði rættarmálið ímóti Slobodan Milosevic**



*-Framferðin hjá Slobodan Milosevic var átøk ræðuleikunum í miðøldini, segði høvuðsákærin, tá rættarmálið í Haag byrjaði í gjár*

*Mynd: Reuter*

Rættarfundurin varð settur klokkan hálvgum tíggju í gjár, og hóast hann varð sjónvarpaður beinleiðis, tóktist Milosevic ikki serliga ávirkaður av tí, sum hendi.

Carla del Ponte legði fyri við at siga, at fyrrverandi jugoslaviski forsetin er ákærdur fyri harðskap, ið minnir um tað, sum hendi í miðøldini, eins og hann eisini er ákærdur fyri við køldum blóði at hava lagt ein væl skipaðan útreinsingarpolitikk til rættis.

Hon legði dent á, at Milosevic skal sjálvur standa til svars fyri tað, sum hendi, og at dómstólurin ikki fer at býta ábyrgdina millum hann og nakran annan.

- Eingin statur ella felagsskapur verður stevndur fyri rættin í hesum máli, segði Carla del Ponte. Hon segði, at rættarmálið ímóti Milosevic skal vísa umheiminum, at eingin kann seta segt sjálvan oman fyri lógina.

- Sum ákæri umboði eg ikki bara ST, men alt heimssamfelagið, segði ákærin.

Hon boðaði frá, at ákæruvaldið fer við frásagnum og vitnum at prógva, at tann skipaði politikkurin hjá fyrrverandi jugoslaviska leiðaranum kostaði fleiri túsund albanum og kosovoalbanum lívið, og at onnur vóru fyri ágangi av ymsum ómenniskjansligum slagi.

- Alt, sum hann gjørdi, tænti einans endamálinum at fáa størri vald, segði Carla del Ponte.

Hon legði afturat, at ákæruvaldið fer at lata fleiri av offrunum vitna ímóti Milosevic, men øll kunnu ikki vitna, tí tey eru ikki á lívi longur, segði hon.

Millum teirra, sum eisini skulu vitna í Haag, eru kosovoalbanski leiðarin Ibrahim Rugova og fyrrverandi amerikanski semingsmaðurin William Walker.

Ákæruvaldið hevur heilar 66 ákærur ímóti Milosevic. Verður hann dømdur sekur, kann hann fáa lívlanga fongsulsrevsing. Roknað verður við, at rættarmálið fer at vara tvey ár.

# Avstralia lurtaði eftir telefon-samrøðunum hjá "Tampa"

**Stjórnin í Avstralia er ákærd fyri at hava lurtað eftir telefon-samrøðum hjá norska farmaskipinum "Tampa", tá skipið tók fleiri hundrað flóttafólk upp seinasta summar**

AVSTRALIA
*Árni Joensen*

Tað er enska blaðið The Daily Telegraph, sum avdúkar, at avstralsku myndugleikarnir lurtaðu eftir telefonsamrøðunum, sum "Tampa" hevði við land, eftir at skipið hevði tikið flóttafólkini av einum søkkandi skipi.

Sambært blaðnum lurtaði avstralska fregnartænastan DSD eftir samrøðunum, sum manningin á "Tampa" hevði við altjóða flutningssamgonguna ITF og avstralska sjómannafelagið. Fregnartænastan lurtaði eisini eftir telefomsamrøðunum millum flutningssamgonguna og sjómannafelagið.

Nú er avstralska fregnartænastan ákærd fyri at hava brotið sínar heimildir, tí hon lat stjórnini avrit av telefonsamrøðunum. Hetta er einans loyvt, um myndugleikarnir meta, landsins trygd er í vanda, ella tá talan er um sera álvarsom brotsverk.

Andstøðuleiðarin í Avstralia, Simon Crean, sigur, at málið er sera álvarssamt, og hann hevur nú kravt at fáa eina frágreiðing frá forsætisráðharranum John Howard.

Stjórnin verjir avgerðina hjá fregnartænastuni við at vísa á, at fleiri av flóttafólkunum hóttu norska skiparan Arna Rimnan. Ein onnur orsøk til avgerðina var, at avstralskir hermenn vóru umborð á skipinum, sigur stjórnin.

"Tampa" tók 438 flóttafólk av einum skipi, sum var komið í havsneyð, men norska skipið slapp ikki at seta tey í land á Jólaoynni, sum norski skiparin ætlaði.

Úr Norðurlondum:

## Venda Brixtofte bakið

Tær nógvu avdúkingarnar um virksemið hjá borgarstjóranum í danska býnum Farum, Peter Brixtofte, hava nú eisini fingið hansara fólkatingsveljarar til at venda honum bakið.

Peter Brixtofte hevur verið fólkatingsmaður fyri Vinstra í Otterupvaldøminum á Fyn síðani 1990, men sambært blaðnum Fyens Stiftstidende ætla fólk í valfelagnum ikki at stilla hann uppaftur. Valfelagið fer at taka endaliga støðu til spurningin mánadagin í næstu viku.

## Vænta mótmæli

Myndugleikarnir í Norðurnoregi eru farnir at fyrireika seg til umfatandi mótmælistiltøk ímóti ætlanini um oljuútbyggingar í Barentshavinum. Fleiri felagsskapir hava boðað frá, at teir fara at skipa fyri mótmælum, og mánadagin greiddu umboð fyri felagsskapin Nator og Ungdom løgregluni í Hammerfest frá sínum mótmælisætlanum.

Løgregluovastin í Hammerfest sigur, at mótmælistiltøkini verða helst tey størstu síðani 1979, tá nógvir norðmenn mótmæltu vatnorkuútbyggingini í Alta og Kautokeino. Hendir tað, noyðist løgreglan í Norðurnoregi at fáa hjálp, sigur ovastin. Summir av felagsskapunum, sum ætla sær at mótmæla oljuætlanunum í Barentshavinum, hava ávarað um, at teirra mótmælistiltøk møguliga fara út um lógarinnar rammur.